Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Magnus Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í uttanríkis- og vinnumálum

Evni : Flutningur av seyði millum oyggjar

Spurningar:

1. Nær og hví er avgerð tikin um at seta forboð - uttan undantaksloyvi – at flyta livandi seyð av Streymoynni, Eysturoynni og Fugloynni ?
2. Hvussu er støðan við ridluskriða á Streymoynni, Eysturoynni og Fugloynni í dag?
3. Er tað bert livandi seyður, sum ber ridluskriðasmittuna og ikki t.d. avroð ella annað av seyði?
4. Er loyvi at flyta og spreiða seyðatøð av Streymoynni, Eysturoynni og Fugloynni yvir á aðrar oyggjum í Føroyum?
5. Hvat skal til og nær kann væntast, at undantaksloyvi aftur kann verða givið at flyta livandi seyð av Streymoynni, Eysturoynni og Fugloynni – livandi seyð, sum skal slaktast?

Viðmerkingar:

Sambært kunngerð nr. 3 frá 14. januar 2003 um forboð móti flutningi av livandi kleyvdýrum oyggjanna millum v.m.

er tað ikki loyvt at flyta livandi seyð ímillum oyggjarnar í Føroyum. Tó kann Heilsufrøðiliga starvsstovan geva undantaksloyvi, um flutningurin ikki førir við sær munandi vanda fyri sjúkuspjaðing. Tá skal umsókn sendast fyrst til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

Tað er ikki loyvt at flyta seyð, sum hevur sjúkutekin, ella at flyta hann frá djórahaldi við smittandi sjúku. Heldur ikki er loyvt at flyta seyð úr hagaparti, har ridluskriði (scrapie) er staðfestur. Heilsufrøðiliga starvsstovan kann tó geva undantaksloyvi til hetta.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur tikið avgerð um, at flutningsloyvi ikki verður givið til flutning av livandi seyði av Streymoynni, Eysturoynni og Fugloynni. Hetta fyri at fyribyrgja, at ridluskriði spjaðist til fleiri oyggjar í Føroyum. Heldur ikki verður flutningsloyvi latið úr ridluskriða-oyggjunum, til seyð, ið skal slaktast.

Nú hesi forboð hava verið galdandi í nógv ár, so er áhugavert at fáa at vita, hvussu støðan er á økinum í dag, og hvussu vánirnar eru fyri, at hesi forboð verða avtikin.

Á Løgtingi 24. november 2025

Magnus Rasmussen